# Fleiri enn 3000 fólk vitjaðu Norðuratlantsbólkin

Fleiri enn 3000 fólk vitjaðu Norðuratlantsbólkurin í samband við árligu mentanarnáttina í Keypmannahavn, sigur bólkurin í tíðindaskrivi.

Á mentanarnáttini luttók Norðuratlantsbólkurin saman við skrivstovuni hjá Norðurlandaráðnum. Á skránni var millum annað spurnarkapping um norðurlondini, har høvuðsvinningurin var ein ferð fyri tvey við Atlantic Airways. Føroyska útisetakórið Mpiri sang og Grønlendski bólkurin Nanoq Jam spældu eisini.

Norðuratlantsbólkurin sær luttøkuna á mentanarnáttini sum upplýsandi arbeiði millum føroyingar og grønlendingar í Danmark

# 4.500 fólk til gallakvøld hjá Føroya Banka

Gallakvøldini hjá Føroya Banka í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið í Havn, á Skála og í Klaksvík vórðu eftir lítlari løtu fullteknað hósdagin, og nú eru bara nøkur fá pláss eftir í Trongisvági.

Tilsamans vóru 740 pláss boðin út aftrat til kvøldini í Havn og 200 til hvørt av hinum støðunum. Nakrir fáir minuttir gingu, so var fullteknað í Havn, og eftir tveimum tímum var fullteknað í Klaksvík og á Skála. Nú eru einans 100 pláss eftir í Trongisvági.

Tilsamans verða 4.500 fólk til tey fimm gallakvøldini frá 22. til 26 oktober. Fleiri fólk rúmast ikki í hallunum orsakað av eitt nú krøvum um trygd, og Jacob Haugaard og Finn Nørbygaard fáa verið við fimm kvøld.

Skráin fyri kvøldini: Jacob Haugaard og Finn Nørbygaard, Kórið Salt, Brekkubrothers, filmur framleiddur til høvið, trummushow, lættur og góður biti.

# Breckmann brøðurnir keypt bygningin hjá Brockie

**Gunnar Breckmann sigur, at teir ikki vita rættiliga, hvat teir skulu nýta nýkeypta bygningin hjá Brockie til. - Møguleikarnir eru tó nógvir, sigur Gunnar**

KEYP & SØLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Gunnar, Páll, og Óli Breckmann hava stovnað nýtt partafelag. Teir hava keypt bygningin hjá Brockie, og endamálið er at hava eitthvørt virksemi í honum. Bygningurin hevur leingi verið nýttur sum bilaverkstaður og bilsøla. Men Gunnar Brockie, sum er stjóri í nýggja partafelagnum, er ikki heilt vísur í, hvat virksemi fer at vera í bygninginum framyvir.

– Vit hava fyri sovítt ongar ætlanir um, hvat vit skulu nýta bygningin til. Tað hendi rættiliga knappligt, at møguleikin at keypa stakk seg upp. Vit fara at tosa saman skjótt um hetta.

Gunnar sigur, at møguleikin at keypa bygningin hjá Brockie var ov góður til at siga nei til.

– Talan er um ein bygning, sum liggur mitt í Havnini. Tú hevur alskyns møguleikar við einum tílíkum bygningi.

Gunnar rekur eisini møblasøluna Eikin saman við konuni og svágri sínum.

– Ein møguleiki er at útbyggja virksemi hjá Eikini í nýggja bygninginum. Núverandi hølið eru rættiliga avmarkað. Økið rundanum er friðað, og tí eru ikki stórir møguleikar fyri útbyggingum. Tí kundi hetta verið ein møguleiki, men einki er vist enn.

Gunnar og Páll fara at reka nýggja partafelagið. Teir eru báðir vanir við vinnulív, og nú fara teir so í holt við nýtt virksemi í bygninginum hjá Brockie.



*Brøðurnir Breckmann hava keypt bygningin hjá Brockie*

*Mynd (Jens Kr. Vang)*

# Novemberlegurnar aftur í ár

**Tvey tey fyrstu vikuskiftini í november verða novemberlegurnar hjá Heimamissiónini. Vit vilja geva ungdóminum eitt positivt upplivilsi av at vera saman um Guds orð, sigur Pól Johannesen, ungdómsráðgevi hjá Heimamissiónini**

NOVEMBERLEGA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Novemberlegurnar eru fyri ungdóm frá 7. - 10. flokk. Heimamissiónsungdómur skipar fyri*

*Mynd: Trúboðin*

Talan er um legur fyri ungdóm frá 7. - 10. flokk. Fyrra legan verður 3. - 5. november fyri 7. og 8. flokk. Seinna legan 10. - 12. november verður fyri 8. - 10. flokk.

Pól Johannesen er ungdómsráðgevi hjá Heimamissiónini. Hann sigur, at undirtøkan plagar at vera sera góð til hesar legurnar.

– Novemberlegurnar hava verið í nógv ár. Tað hevur altíð verið sera góð undirtøka fyri legunum. Fyri nøkrum árum síðani høvdu vit novemberlegur annað hvørt ár, tá ið LUS (LandsUngdómsStevna) ikki var. Men nú hava vit tað hvørt ár, tí at annars verður eitt stórt glopp millum summar- og nýggjárslegurnar. Vanliga eru tað millum 300 og 400 fólk á báðum legunum tilsamans, sigur Pól.

Umframt bíbliutímar og møti eru eisini nógv onnur tiltøk.

– Vit hava altíð eitt evnið fyri legunum. Í ár verður evnið „Hvar er Gud?“ og „Hvat vil Gud mær?“. Umframt góða undirvísing vilja vit eisini geva teimum ungu eitt positivt upplivilsi av at vera saman um Guds orð. Tí leggja vit stóran dent á trivna og tann sosiala partin, sigur Pól.

– Tilmeldingarnar nærkast 200. Enn er ikki ov seint at tekna seg. Tað ber til at tekna seg á heimasíðuni hjá Heimamissiónini www.mission.fo. Øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Pól Johannesen at enda.

# Evnisdagur um Ísrael á Skála

**Sunnudagin 22. oktober skipar Ísraelsmissiónin fyri einum evnisdegi um Ísrael í Meinigheitshúsinum á Skála**

ÍSRAEL
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Tiltakið byrjar klokkan 16 sunnudagin, har ið tað verður kunnað um støðuna hjá Ísrael. Eftir hetta verður bíbliutími við Ásbjørn Jacobsen. Hann fer at tosa um evnið „Leiklutur Ísrael nú og í endatíðini“. Klokkan seks verður nátturði og klokkan sjey verður møti, har ið Johan Henriksen úr Klaksvík kemur at tala um „Liva vit í seinastu tíðunum?“. Við á møtinum verður eisini Ísralestoymið hjá Heimamissiónini, sum gjørdist kent í summar, tá ið tey endaðu mitt í einum stríð millum ísraelsku stjórnuna og Hamas. Tey koma at greiða frá ferðini. Sangluttøka verður eisini við lokalum av Skála.